tíðindablaðið
# sosialurin
Nr. 46 Fríggjadagur 7. mars 1997 71. árgangur Kr. 7,00

Mynd: Jóhan Helmsdal



*Húsini stóðu í ljósum loga, tá Sløkkiliðið kom á staðið. Hálvan tíma seinni var eldurin bæstur*

## Øll yvirtromin brann

**Eingin var inni, tá húsini í Fútalág 23 í Havn brádliga stóðu í ljósum loga**

Síða 10

---

**Virkið kann gerast dýrari enn væntað:**

# Sands kommuna spælir við eld



Samstundis sum gerðarrættur viðger málið, samráðast sandingar um at keypa virkið

**Fær kommunan viðhald í gerðarrættinum um flakavirkið, er vandi fyri at virkið verður nogv dýrari enn sandingar annars kundu fingið virki fyri**

Síða 6

---

## Bretar fáa hálvt ár afturat



**– Vit ætla at enda samráðingarnar um markið um eitt hálvt ár, sigur Niels Helveg Petersen, uttanríkisráðharri**

Síða 4

---

## – Eg royni at svara skilliga

**Hetta er sætta árið, Sigmund Poulsen svarar løgfrøðisligum spurningum í útvarpinum - og enn eru nógvir spurningar, ið stundir ikki verða til at svara**

Síða 11



Sigmund Poulsen, advokatur

**Fløgur úr Noregi**

*Nu hava vit alt katalogið hjá GRAPPA (fólkatónleikur) og hjá SIMAX (klassiskur tónleikur)*

***– 250 ymiskar fløgur***



Fyri hvørja fløgu bara **129:-**

TUTL

**Ford KA**

OPIÐ HÚS LEYGARDAGIN

Roynið og síggið nýggja KA-bilin frá FORD. Sí annars lýsing á síðu 3



Ford P/f Wenzel

*Niels Helveg Petersen, uttanríkismálaráðharri:*

# Vit geva bretum hálvt ár aftrat

*-Miðað verður ímóti at enda samráðingarnar um markið millum Føroyar og Bretland um hálvt ár, sigur uttanríkismálaráðharrin*

DAGNY JOENSEN
JENS KR. VANG

Á ferðini í Føroyum hevur Niels Helveg Petersen havt fund við Løgtingsins uttanlandsnevnd, har m.a. spurningar um markið millum Bretland og Føroyar vóru umrødd.

Fundur verður millum partarnar í Bretlandi 2. apríl í ár, og uttanríkismálaráðharrin segði á tíðindafundinum, at nú skuldi ferð fáast á samráðingarnar. Einki er hent í málinum síðani í fjør vár. Nú skulu bretar nágreiniliga svara spurningum, um partarnir skulu samráðast víðari.

**Samráðingarloysnin er gagnligast**

- Persónliga haldi eg tað verða best, um vit fáa eina samráðingarloysn, heldur enn hina loysnina, sum er at reisa málið við havrættardómstólin í Haag. Rættarmál eru drúgv, og tí er best, um vit kunnu samráðast til eitt úrslit, sigur Niels Helveg Petersen.

*- Bretar hava kannað (designerað) sær tvey teigar í Hvíta økinum. Hvussu ávirkar tað samráðingarnar?*

- Hóast vit helst vildu verið tað fyri uttan, so hevur tað ikki óheppna ávirkan á samráðingarnar, at bretar kanna sær hesi øki, tí tey hoyra natúrliga til bretska partin av markinum.



*Niels Helveg Petersen, uttanríkismálaráðharri: Hóast ein samráðingarloysn hevði verið best, so virði eg avgerðina hjá føroyingum, um teir velja at leggja málið fyri havrættardómstólin í Haag*



*Niels Helveg Petersen, uttanríkismálaráðharri og Edmund Joensen, løgmaður, vóru báðir nøgdir við úrslitið av vitjanini*

**Vildu helst verið bretska kravið fyri uttan**

- Eg kann tó viðmerkja, at vit helst vildu verið hetta kravið frá bretum fyri uttan, sigur Niels Helveg Petersen.

Uttanríkismálaráðharrin helt, at tað var meira umráðandi at fáa ferð á samráðingarnar, tá apríl mánaði er farin framvið. Hann metti at ein avgerð møguliga kann falla um hálvt ár.

**Um neyðugt politiska viðgerð**

Edmund Joensen, løgmaður var eisini staddur á tíðindafundinum. Hann legði aftrat, at samráðingarnar enn vóru á embætismanna stigi, men um einki hendir í málinum innan hálvt ár, so var møguleikin at taka tað upp politiskt, áðrenn avgerð verður tikin um at fara til havrættardómstólin í Haag.

Niels Helveg Petersen

- Vit virða føroysku avgerðina um at reisa málið í Haag. Um tit ikki vilja samráðast meira, so taka vit undir við at reisa málið við dómstólin í Haag. Men, sum sagt, tað hevði verið betur, um vit fingu eina samráðingarloysn, segði uttanríkismálaráðharrin á tíðindafundinum.

Niels Helveg Petersen fór aftur til Danmarkar á middegi í gjár.

# Søgulig kanning sett í verk

*Peningur er settur av til søgufrøðing at kanna skjøl hjá ríkisstjórini í USA, var m.a. upplýst á tíðinadafundi í gjár*

DAGNY JOENSEN
JENS KR. VANG

Á tíðindafundi í gjár, segði Niels Helveg Petersen, at ferð hansara í Føroyum hevði verið væleydnað og og at nógv var fingið burturúr, í royndini at styrkja samskiftið millum uttanríkismálaráðið og landsstýrið.

Ymisk mál hava verið viðgjørt, eitt nú er gjørt av at fáa lýst viðurskiftini millum Nato og Føroyar í tíðina tá kalda kríggið valdaði.

**DUPI skal ráðgeva**

- Vit hava gjørt av, at umboð fyri DUPI skulu koma til Føroyar at skifta orð um málið, og síðani at virka sum ráðgevar, segði Niels Helveg Petersen.

DUPI er óheftur danskur granskingarstovnur, sum m.a. hevur arbeitt við at granska leiklutin hjá NATO í Thule, og spurningin um kjarnorkuvápn vóru í Grønlandi undir kalda krígnum.

-Fyribils er gjørt av, at uttanríkisráðharrin skal venda sær til granskingarstovnin, og í fyrstu atløgu skal stovnurin gera ein arbeiðssetning fyri søguligu kanningina.

Løgmaður hevur í hesum sambandi, eftir áheitan frá tinginum, sett eina nevnd, sum skal kanna skjøl hjá ríkisstjórnini í USA. Í nevndini sita: Jóannes Dalsgaard, Jóan Pauli Joensen, Jákup Thorsteinsson og Rúni Joensen.

**Føroyskt ES-umboð í Brussel**

Uttanríkismálaráðharrin hevur eisini samráðst við landsstýrið um at bøta um núgaldandi handilssáttmálan við ES, og at fáa í lag samskifti við Baltisku londini og og Polen, sum serliga er ein marknaður fyri pelagiskum fiskasløgum.

Umframt tað er gjørt av at játta pening til eitt ES umboð fyri Føroyar í Brussel, og at hesin í fyrstu atløgu skal húsast á donsku umboðsstovuni. Ætlanin er seinni, at føroyska ES-umboðið skal flyta á belgisku sendistovuna, eins og grønlendska umboðið í dag hevur til húsa.

**Embætismannanevnd stovnað**

At enda upplýsti løgmaður og uttanríkismálaráðharrin, at ein embætismannanevnd við donskum og føroyskum persónum, skal setast í næstum. Hon skal hava til uppgávu at at tosa um øll uttanríkismál, sum hava við Føroyar at gera.

Embætismannanevndin skal virka undir leiðslu av stjóranum í uttanríkismálaráðnum í Danmark og løgmansstjóranum í Føroyum. Umframt hesi, verða triggir limir tilnevndir lutfalsliga í Føroyum og í Danmark.

Embætismannanevndin fær myndugleika ad hoc at at skoyta uppí ella finna loysnir á ávísum uppgávum.

Donsk - føroyska embætismannanevndin skal í minsta lagi hava tveir fundir árliga, og arbeiðssetningurin hjá nevndini skal endurskoðast um tvey ár, verður m.a. sagt í arbeiðssetninginum.

**Tøkk**

Hjartaliga tøkk til øll tykkum, sum heiðraðu meg á 40 ára starvsdegnum hjá P/F Poul Hansen.

*Heilsan,*

**Jens Petur Egholm**

†

**ROSA BLÁBJØRG,**
**Fuglafjørður**

Okkara kæra Rosa-mostir andaðist mikudagin 5 mars 1997 á Ellis- og Røktarheiminum í Runavík.

Bønarhald verður í kvøld kl. 18.

Jarðarferðin verður úr Fuglafjarðar kirkju leygardagin 8. mars kl. 14.00.

*Fyri tey avvarðandi,*
**Lena**